Gunnar segði úrslitið

Talan var um ovurstóra hending, tá Danmark á Nya Ullevi í Göteborg í 1976 vann fyrsta útisigurin á svium í 39 ár. Forrestin við føroyska kenninginum, Ove Flindt Bjerg, sum sigursmálskjútta. Tá í tíðini var ikki sent beinleiðis í sjónvarpinum, men frásøgumaðurin, Gunnar »Nu« Hansen, var somikið ovurfegin, at hann segði úrslitið av dystinum, longu sum forskotna varpingin byrjaði.

Julian nærkast oddanum

Hóast Julian Johnsson og liðfelagarnir úr Svendborg ikki fingu fult á útivølli móti Ikast, so vunnu teir seg nærri uppflytingarplássunum um vikuskiftið. Hóast heimasíðan hjá Svendborg skýrdi Julian Johnsson at eiga ein týdningarmiklan leiklut í dystinum um vikuskiftið, so kundi fyrrverandi landsliðsleikarin ikki verja fyri, at hann og liðfelagarnir ikki fingu fult á útivølli móti Ikast. Støðan gjørdist 1-1, eftir at gestirnir vóru á odda í steðginum. Svendborg liggur í løtuni á triðja plássinum í triðbestu donsku deildini, ájavnt í stigum við Blokhus FC, sum tapti um vikuskiftið. Á odda er Randers Freja, sum hevur eitt stig fleiri – 20 stig. Fyrrverandi KÍ og B68-framherjin, Jacob Bymar, átti hinvegin týðandi leiklut í 4-2 sigrinum hjá Varde á heimavølli móti Hobro. Hann var tvær ferðir á blettinum undan steðginum, og legði lunnar undir sigurin.

...ældi sín fyrsta landsdyst

kom at verða kendur, sum »Guld-Harald«, og gjørdi hann vart við seg, sum yrkisspælari í Italia.

Olympiska hálvfinalan varð millum teir fyrstu dystirnar, sum danir sóu beinleiðis í sjónvarpinum. Málverjin, Henry From gjørdist legendariskur hendan dystin. Ungarn fekk brotsspark, tá støðan var 1-0 til Danmark. Fyri at psyka ungarska brotssparksskjúttan, Varhidi út, so tók Henry From og klistraði tyggigummi´ið hjá sær á stongina. Varhidi gjørdist so í villareiði av hesum, at hann skeyt eitt miseydnað skot, sum From lættliga tók. Danmark tapti kortini 3-1 til Jugoslavia í finaluni.

Danmark var eisini við til olympisku leikirnar í 1972, har Allan Simonsen veruliga gjørdi vart við seg. Danmark kom tá víðari til millumumfarið.

Danmark lá til eitt pláss í olympisku kappingini í Seoul í 1988. Men Danmark var dømt at tapa ímóti Póllandi í OL-undankappingini, tí teir høvdu brúkt Per Frimann, sum hevði leikbann, og Vesturtýskland slapp tískil til Seoul. Per Frimann-málið er mest pínliga málið hjá DBU í nýggjari tíð.

Í 1962 og 1963 hevði Danmark eitt óvanliga heppið lutakast til EM-undankappingina, sum tá varð skipað eftir cup-leisti. Danmark møtti Malta í 1. umfarinum, Albania í 2. umfarinum, og Luksemburg í 3. umfarinum. Úrslitið var at Danmark kom í EM-endaspælið í Spania í 1964. Men her gjørdist mótstøðan ov sterk. Danmark tapti 3-0 ímóti Sovjetsamveldinum í hálvfinaluni, og í bronsudystinum tapti Danmark 3-1 ímóti Ungarn, aftaná longda leiktíð.

70-árini og 80-árini

Danska landsliðið náddi ikki so ræðuliga nógvum glæsuligum úrslitum í 1970-árunum, men kortini standa nakrir varðar. Í 1971 sleppa yrkisspælarnir loksins at spæla við Danmark aftur.

Tað sæst ikki nøkur framgongd fyrstu árini, men í 1976 eydnaðist tað fyri fyrstu ferð í 39 ár at vinna á Svøríki á útivølli, sum hevði risastóran týdning fyri danir tá, og í 1977 gjørdist Allan Simonsen ársins spælari í Evropa.

Í 1979 setur DBU Sepp Piontek í starv, og nú kemur broyting í. Í 1983 eydnast tað danska landsliðnum at spæla seg í EM-endaspælið. Hetta gerst veruleiki aftaná ein 2-2 javnleik heima, og ein 1-0 sigur á Wembley ímóti Onglandi. Allan Simonsen skjýtur sigursmálið á Wembley uppá brotsspark.

Í EM-endaspælinum vinnur danska liðið nógv hjørtu. Í innleiðandi bólkaspælinum tapa danir tepurt 1-0 til Frakland. Men teir spæla ein dreymadyst ímóti Jugoslavia, sumt teir vinna 5-0, og vinna teir eisini ein ógvuliga dramatiskan dyst ímóti Belgia 3-2.

Danmark møtir Spania í hálvfinaluni. Aftaná vanliga leiktíð stendur á jøvnum 1-1, einki mál kemur í longdu leiktíðini, og liðini fara til brotsparkskapping. Stóra hetjan og málslúkurin, Preben Elkjær, og Danmark var úti, men liðið hevði vunnið nógv fótbóltshjørtu.

HM-undankappingin gjørdist ein sigursgongd hjá dønum, serliga minniligur var heimadysturin ímóti Sovjetsamveldinum, grundlógardagin 5 juni í 1985. Danmark vann minniliga dystin 4-2, Preben Elkjær og Michael Laudrup skutu tvey mál í part í einum dysti, sum mong meta verða tann best spælda á danskari jørð.

Danmark gjørdi veruliga vart við seg í HM-endaspælinum í 1986. Teir vunnu 1-0 á Skotlandi, ein knúsandi 6-1 sigur á Uruguay og 2-0 á Vesturtýsklandi. Í 1/8 finaluni ímóti Spania gekk reint galið, Danmark førdi 1-0, men so gjørdi Jesper Olsen eina minniliga afturlegging, sum Emilio Butragueno fangaði, og áðrenn danir høvdu vent sær vóru teir aftanfyri 5-1.

Danmark var við til EM-endaspælið í 1988, men teir taptu allar teir innleiðandi dystirnar ímóti Spania, Vesturtýsklandi og Italia.

Danmark kiksaði eisini í HM-undankappingini, har teir taptu avgerandi dystin ímóti Rumenia í Bukarest. Og sluppu teir soleiðis ikki til HM-endaspælið í Italia.

EM-gull og HM-fjórðingsfinala

1990-árini blivu tey mest minniligu hjá danska landsliðnum.

Danmark spældi seg ikki upprunaliga til EM-endaspælið í Svøríki í 1992. Men tá Jugoslavia bleiv offur fyri tí altjóða stongslinum máttu allir teir donsku landsliðsspælarnir avlýsa summarferiuna hjá sær, og møta upp í Svøríki.

Danmark byrjaði heiðurliga við einum 0-0 javnleiki ímóti Onglandi, næsta dystin taptu danir 1-0 ímóti Svøríki, men so byrjaðu undur at henda.

Frakland var favorittur í síðsta bólkadystinum, men danir gjørdu bart og vunnu 2-1.

Danir vóru aftur undirtippaðir í hálvfinaluni ímóti Hollandi, og vóru teir eisini undir nógvum trýsti, bæði í vanligu og longdu leiktíðini. Aftaná javnleik 2-2 og 120 minuttirs spæl fóru liðini til brotssparkkapping. Peter Schmeichel tók brotssparkið hjá Marco van Basten, og tá Kim Christofte skoraði til 5-4 var enn eitt fótbóltsundur føtt.

Danir vóru aftur undirtippaðir til finaluna ímóti Týsklandi, men við tveimum ótrúligum málum hjá John »Faxe« Jensen og Kim Vilfort, meistarligum bjargingum hjá Peter Schmeichel, og góðum verjuspæli drógu danir tað stóru sensasjónina í hús.

Tíverri gekk ikki so væl hjá dønum í HM-kvalifikasjónini, tá danir taptu avgerandi dystin ímóti Spania í Sevilla.

Danir spældu seg til EM-endaspælið í Onglandi í 1996. Danir ruku út eftir innleiðandi bólkaspælið. Danir spældu javnt 1-1 við Portugal, og vunnu 3-0 á Turkalandi, men 0-3 tapið ímóti Kroatia gjørdist avgerandi.

Danmark spældi seg til HM-endaspælið í 1998. Tað byrjaði eitt sindur trilvandi við einum teprum 1-0 sigri á Saudi Arabia, og einum 1-1 javnleiki ímóti Suður-Afrika. Triðja bólkadystin taptu danir 2-1 ímóti Fraklandi. Tíbetur fyri danir spældi Suður-Afrika javnleik 2-2 ímóti Saudi Arabia, og Danmark kom í 1/8 finaluna. Í 1/8 finaluni spældu danir ein dreymadyst ímóti Nigeria, sum endaði við einum knúsandi 4-1 sigri til danir. Talan er um ein tann besta dystin danir hava spælt.

Í fjórðingsfinaluni møttu danir Brasil, men tá gjørdist danir og Peter Schmeichel ov stuttir, og endin varð, at Brasil vann 3-2.

Í 1995 vunnu danir Confederations Cup kappingina fyri landslið, sum var hildin í Saudi Arabia. Í finaluni vunnu danir 2-0 á Argentina. Bæði tá Danmark vann hesa kappingina í 1995, og tá teir vunnu EM í 1992 var fjónbúgvin, Richard Møller Nielsen venjari hjá danska landsliðnum.

Aldarskiftið og aftaná

Danmark spældi seg til EM-endaspælið, sum var í Hollandi og Belgia í 2000. Talan gjørdist um eina sera miseydnaða kapping. Danir taptu 0-3 ímóti bæði Hollandi og Fraklandi, og 0-2 ímóti Kekkia, og fóru teir út við einum braki.

Við Morten Olsen eydnaðist tað at spæla seg til HM-endaspælið í Japan og Suður-Korea í 2002. Og væl gekk hjá dønum í innleiðandi bólkaspælinum. Danmark vann 2-1 á Uruguay, spældi 1-1 ímóti Senegal, og so sendi danir táverandi heims- og evropameistarnar, Frakland út í myrkrið við einum minniligum 2-0 sigri. Í 1/8 finaluni bíðaði England, og gekk av skriðuni hjá Danmark. Longu aftaná 5 minuttir kom England á odda 1-0, og endin var, at England vann 3-0.

Danmark tók aftur lut í EM-endaspælinum í Portugal í 2004, og var tað sætta EM-endaspælið hjá Danmark á rað. Danmark spældi fyrst 0-0 ímóti Italia. Næsta dystin vunnu teir 2-0 á Bulgaria. Ì síðsta dystinum møtti Danmark Svøríki, og spældu brøðratjóðirnar ein 2-2 javnleik, sum gjørdi, at bæði norðanlondini sluppu í fjórðingsfinaluna, og Italia fór út í myrkrið. Í fjórðingsfinaluni vann Kekkia ein knúsandi 3-0 sigur á Danmark, og hevur Danmark ikki verið við í fremstu røð síðani.

Tað miseydnaðist hjá Danmark at spæla seg til HM-endaspælið í 2006, og EM-endaspælið í 2008. Nú er Danmark í HM-undankappingarbólki saman við m.ø. Svøríki og Portugal. Men í kraft av einum minniligum 3-2 sigri í Portugal eru tær donsku vónirnar tendraðar aftur. So danska landsliðið aftur kann leggja nýggjar kapitlar aftrat stoltu søgu sínari.

Størsta løtan í donskum fótbólti kom í juni mánaði 1992. Við 2-0 sigri á Týsklandi í finaluni vann Danmark fyri higar til einastu ferð EM-heitið í fótbólti